ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 12. februar 2010

# Vistu einki um leikbann

**Eftir seinastu fyrireikingarnar til steypafinaluna leygardagin fekk Neistavenjarin at vita, at hann ikki kundi brúka Ára Dam í málinum**




Jákup Mørk

Ári Dam fekk reytt kort, tá Neistin næst seinasta sunnudag vann heimadyst móti KÍF. Alt fyri eitt varð tosað um, um hetta mundi kostað ein ella tveir daga leikbann, og í Neistanum var tað í so máta heppið, at avtalað varð Emil K. Jacobsen, sum í løtuni styrkir um hópin hjá liðnum.

Hinvegin komu eingi boð um, at Ári skuldi hava tveir daga leikbann, og tí varð roknað við, at hann var millum spælararnar leygardagin. Og í øllum førum var tað hetta, sum var partur av teimum fyrireikingum, sum Ingi Olsen hevði við sínum monnum eftir venjingina hóskvøldið.

– Men eg kann bara staðfesta, at tað var tað ikki. Meðan venjingin var, hevði eg fingið boð um, at Ári hevur fingið tveir daga leikbann, og at avgerðin ikki kann kærast.

– Í so máta er talan greið, og vit mugu rokna málið sum endað, tí vit fáa einki gjørt við tað kortini. Men sjálvandi er tað ikki nøktandi, at boðini koma á hendan hátt. Tað eru 12 dagar síðani, at hann fekk reyða kortið, og nú boðini koma, er tað bara sum mailur frá einum privatpersóni. So tað var kanska heppið, at vit vistu av, at viðkomandi veruliga sat í Kappingarnevndini.

- Vit hava enntá fleiri ferðir rykt og spurt okkum fyri, um talan bleiv um ein ella tveir dagar leikbann, so tað minsta tey kundu gjørt, var at boða okkum frá hesum á ein virðiligan hátt. Hendan framferðin vísir í øllum førum ógvuliga lítla virðing fyri okkara fyrireikingum til ein somikið týðandi dyst, og eg kann ikki ímynda mær, at hetta er ein framferð, sum Kappingarnevndin er serliga errin um, sigur Neistavenjarin.



**Tað skuldu ganga 12 dagar, áðrenn Kappingarnevndin hjá HSF tók støðu til, um reyða kortið hjá Ára Dam móti KÍF skuldi kosta ein ella tveir daga leikbann. Boðini komu til Neistan hálvtannað samdøgur undan steypafinaluni**

## 30 doping-syndarar

**30 íðkarar, sum høvdu ætlað sær til OL, hava nú fingið at vita, at tey eru ikki vælkomin, tí tey hava nýtt ólóglig evni**




Heri Simonsen

Altjóða olympiska nevndin, IOC boðar frá, at tey sum eru tikin sleppa ikki at taka lut á OL-vetrarleikunum, sum byrja í Vancouver í Kanada í morgin.

Tað er altjóða antidopingsfelagsskapurin, WADA, sum hevur lagt úrslitini fram fyri altjóða olympisku nevndina.

Antidopingarfelagsskapurin í Noregi, Antidoping Norge sigur við norska kringvarpið, at tey vita ikki úr hvørjum landi teir dopaðu íðkarnir koma frá, og hvørja ítróttargrein hesi íðka. Ongar fráboðanir eru komnar um, at nakar norskur OL-íðkari er millum tey sum hava dopað seg.

WADA hevur ikki viðmerkt tølini enn, men felagsskapurin fer at hava ein tíðindafund í kvøld klokkan 19. - WADA hevur kunnað okkum í dag, at talan er um 30 íðkarar, sum ikki sleppa at taka lut á olympisku vetrarleikunum. Orsøkin er, at hesi hava positivar dopingroyndir, sigur samskiftisstjórin hjá IOC, Mark Adams.

# Noreg er fremst á vetrarleikunum

**Finnland og Svøríki eru eisini at finna millum 10 tey ovastu londini í heiðursmerkjayvirlitinum**




Heri Simonsen

Komandi vikuskiftið byrja olympisku vetrarleikirnir í Vancouver í Kanada.

Fer tað at ganga, sum tað plagar at ganga á olympisku vetrarleikunum, so hevur norska fólkið nógv at gleða seg til. Tí Noreg er eitt stórveldi, tá tað kemur til olympisku vetrarleikirnar. Í tí søguliga yvirlitunum, har roknað verður frá teimum fyrstu vetrarleikunum í 1924, og fram til dagin í dag, er Noreg tann nógv mest vinnandi OL-tjóðin.

Tey 20 fremstu londini í tí søguliga yvirlitinum eru hesi, við vunnum gullmerkjum, silvurmerkjum og bronsumerkjum :

| Land | gull | silvur | bronsa | ialt |
|---|---|---|---|---|
| Noreg | 98 | 98 | 84 | 280 |
| Sovjetsamveldið | 87 | 63 | 67 | 217 |
| USA | 78 | 80 | 58 | 216 |
| Týskland | 68 | 65 | 46 | 179 |
| Eysturríki | 51 | 64 | 70 | 185 |
| Svøríki | 43 | 30 | 44 | 117 |
| Finnland | 42 | 57 | 52 | 151 |
| Eystur-Týskland | 39 | 36 | 35 | 110 |
| Kanada | 38 | 38 | 43 | 119 |
| Sveits | 37 | 37 | 43 | 117 |
| Italia | 36 | 31 | 34 | 101 |
| Russland | 33 | 24 | 19 | 76 |

| Land | gull | silvur | bronsa | ialt |
|---|---|---|---|---|
| Niðurlond | 25 | 30 | 23 | 78 |
| Frakland | 25 | 24 | 32 | 81 |
| Suður-Korea | 17 | 8 | 6 | 31 |
| Vestur-Týskland | 11 | 15 | 12 | 38 |
| Japan | 9 | 10 | 13 | 32 |
| Stórabretland | 7 | 3 | 10 | 20 |
| Kina | 4 | 16 | 13 | 33 |
| Kroatia | 4 | 3 | 0 | 7 |